Løgmaður: – Sparikatalog uppá 60 mill. klárt:

# Tað almenna undir luppin

**Almenni sektorurin er vaksin við 1100 mill. kr. seinastu fimm árini. Eru allar hesar milliónirnar brúktar til tað optimala? Tað vil løgmaður hava svar uppá og fer nú at seta luppin á alt tað almenna Føroyar. Málsetningurin hjá samgonguni um, at útreiðslurnar skulu vaksa minni enn inntøkurnar, skal haldast. Uppskot er gjørt til sparikatalog uppá 60 mill. kr., sum krevur lógarbroytingar**



*Anfinn Kallsberg, løgmaður: – Tað verður eingin løtt uppgáva at finna stórar sparingar, men henda ikki radikalar broytingar í Fíggjarnevndarviðgerðini eigur tað at bera til*

*Mynd Jens K. Vang*

FÍGGJARLÓG 2003

*Jan Müller*

Annfinn Kallsberg, løgmaður er als ikki samdur við teimum, sum siga, at fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 er einki minni enn eitt óliðugt útkast, sum ikki er gjørt í nóg stórum álvara. Tvørturímóti heldur hann uppskotið byggja á tað lógargrundarlag og tær funktiónir, sum eru, við onkrum undantaki. Man kundi gott koyrt eina fíggjarlóg niðan í tingð, sum segði, at man tók hædd fyri at gera nakrar broytingar. Og so fekk man at síggja, um tær broytingar komu, men tað hevur ikki altíð eydnast so væl vísir løgmaður á.

– Eg kann taka sum dømi at fíggjarlógin fyri 1996, ið varð samtykt við eini óspesifiseraðari sparing upp á 32 mill. kr. Tær blivu als ikki framdar. Verandi uppskot byggir á framskrivingar av teimum útreiðslum, sum galdandi lóggáva hevur við sær.

Løgmaður vísir á, at tey hava arbeitt við postverkinum, og viðgongur, at tað er kanska ein feilur, at tann játtanin ikki er við. Har hevur so verið arbeitt við møguleikanum at selja eini hús á Argjum. Í hesum sambandi nevnir løgmaður, at tað verður eisini arbeitt við at fáa Blaðútberingina við aftur á uppskotið.

Viðvíkjandi undirsjóvartunlinum til Norðoyggjar so er ætlanin at fara niðan í tingið við eini broyting í anleggslógini, tí tað áliggur landsstýrismonnum at koma við eini loysn fyri Lorvíkar bygd. Landsstýrismaðurin skal tí niðan í tingið við Lorvíksprojektinum og har eru menn samdir um at brúka tað, sum ikki verður brúkt á íløgusíðuni til í næsta ár.

Síðani er enn eitt »stríðsmál« Vágs havn. Hon er eisini samtykt, men tað er stuðulsveiting, og tað er spurningurin, nær tað arbeiðið fer í gongd. Tað er tó ikki landsstýrið, sum byggir ta havnina men kommunan. vísir løgmaður á og sigur, at ósemja um hetta má so vera millum Vinnumálaráðharran og Fíggjarmálaráðharra. Ella tað er Fíggjarmálaráðharrin, sum einsamallur hevur tikið ta avgerðina.

Løgmaður roknar við, at framhaldandi fíggjarlógarviðgerðin fer eisini at avspegla tað virksemi, sum fer at verða frá í dag til einaferð í – við broyttari lóggávu. Landsstýrið hevur brúkt nógva tíð at tosa um broytta lóggávu. Tey fyrstu uppskotini eru longu farin út til flokkarnar, og tað koma fleiri komandi dagarnar.

– Tú kanst velja, um tú vil hava eina fíggjarlóg, sum avspeglar tað, sum man ætlar og sum kanska kann vera eitt sindur fiktiv, ella tú kann velja eina fíggjarlóg, sum avspeglar tað, sum er. Og at tú síðani ger tær broytingar, sum eru neyðugur og semja kann fáast fyri.

## Broyta lóggávuna

Løgmaður sigur orsøkina til, at fíggjarlógin sær út sum hon ger, er tann, at vit hava havt samgongusamráðingar út í juni mánað, og tí er man ikki komin í gongd við tí detailieraðu fíggjarlógini. Landsstýrið hevur so valt at siga, at tey politisku tiltøkini, sum samgongan skal gera, skulu fremjast við broyttari lóggávu, har tað er neyðugt at broyta verandi lóggávu. So ger man tær tillagingarnar í álitið, sum kemur fram aftur úr Fíggjarnevndini.

Haraftrat er tað so spurningur um rakstur og rakstrarútreiðslur, um tað verða gjørdar semjur um rationaliseringar og sparing oa. Tað er eingin loyna, vísir løgmaður á, at specifikatiónirnar og tølini, sum standa á fíggjarlógini, eru bara fyri landsstýrismansins rokning. Tað er eingin av hinum landsstýrismonnunum ella løgmaður, sum hevur sæð spesifikatiónirnar, sum eru gjørdar á teimum ymsu málsøkjunum, áðrenn tær eru farnar niðan í tingið, og tað er orsakað av avmarkaðu tíðini eftir samgongusamráðingarnar.

Løgmaður viðgongur, at hetta er sjálvandi ikki gott nokk ella forsvarligt. Tí skal ein komandi fíggjarlóg hava eina aðra gongd enn hendan hevur fingið, nevniliga soleiðis at karmarnir til fíggjarlógina skulu vera lidnir áðrenn summarfrítíðina. Í síðsta lagi fyrst í juni, soleiðis at man í august kann fáa viðgjørt allar tær einstøku dispositiónirnar, sum hvør landsstýrimaður hevur gjørt.

Anfinn Kallsberg, sum hevur sitið sum løgmaður í skjótt fimm ár, sigur víðari, at hyggja vit at hesum seinastu fimm fíggjarlógunum, so er tann samlaði bruttoútreiðsluvøksturin oman fyri milliardina og dylur hann ikki fyri, at ein vøkstur uppá 200 mill. kr. í meðal uppá árið er alt ov nógv. Tað tolir búskapurin als ikki.

## Almennar rationaliseringar

– Skulu vit gera okkum tankar um ein sjálvberandi búskap, so má annað lag koma á. Tí er tað einki yvir at dylja, at tað mugu vera nakrir møguleikar nú at fara inn at hyggja at skipanum, sum møguliga áttu at verið rationaliseraðar og eftirhugdar. Tú ger vanliga slíkt, tá tú kemur inn í eina kreppu. Tað eru nógv dømi um, at vit hava latið lóggávu staðið við alt ov leingi, tí eingi krøv eru sett til broytingar aftur td. endurnýggjan av skipaflotanum, stuðul til fiskivinnuna osfr. Slíkar lógir eru góðar, tá tær koma. Men spurningurin er at fáa politiska undirtøku fyri at avtaka tær, meðan tíð er. Tað er væl hetta, sum skal til nú.

*– Tað ljóðar so lætt og flott!*

– Tað veit eg og viðgangi eisini, at tað er ikki bara lætt.

Hóast tingmenn í samgonguni hava nevnt, at tað verður ikki so torført at fremja sparingar í 100 milliόna klassanum so heldur løgmaður, at man nokk ikki skal vera so bjartskygdur og rokna við, at man fær gjørt tær sparingar uppá nærum onga tíð. – Tað er altíð trupult at at tátta í og fremja broytingar, og tað er oftani nakað, sum tekur langa tíð. Tað, sum tú kanska ger í dag, sær tú ikki aftur fyrr enn um eini trý ár. So man má vera realistiskur eisini. Man skal heldur ikki gera nakað, sum endar við, at knappliga hongur alt í leysum lofti. Tað, sum gerast skal, má gerast við skili.

*– Men fíggjarlógin skal samtykkjast, og tíni egnu samgongufólk tosa um at finna 100 til 200 mill. kr. í sparingum og siga, at hetta entá eigur at verða lætt!*

– Um tað hevði verið so lætt, so hevði tað verið lagamanni. Men eg trúgvi ikki, at tað verður so lætt. Latið okkum nú fara í gongd við at gjøgnumganga tann almenna sektorin, sum er vaksin við 1100 mill. kr. seinastu fimm árini. Eru allar hesar milliónirnar brúktar til tað optimala?

Løgmaður vísir á, at tú fær samtíðis at vita, at tað eru stórir manglar allastaðni, hóast man hevur økt játtanina so nógv. So spurningurin er um hesar krónurnar eru brúktar uppá besta máta fyri brúkaran! - Eg skal ikki seta nakað tal á men kann siga, at samgongan hevur gjørt ein yvirornaðan málsetning um, at útreiðslurnar skulu vaksa minni enn inntøkurnar, og tað er ein málsetningur, sum skal haldast. Tvs. at vit skulu hava eina framdrift móti einum meira sjálvberandi búskapi.

## Sparikatalog

Løgmaður sigur, at landsstýrið hevur arbeitt rættiliga intenst við sparingum av ymiskum slag og hevur gjørt eitt sparikatalog, sum liggur millum 50 og 60 mill. kr. ella eitt sindur meira. Í tí eru ítøkilig uppskot, sum hava verið til viðgerðar bæði í landsstýrinum og úti hjá flokkunum men sum krevja lógarbroytingar. Tvs. pengarnir til tey málsøki, sum man ætlar sær at broyta, standa á verandi fíggjarlóg.

*– Men tað er langt frá 60 uppá møguligar 200 mill. kr. í sparingum?*

– Tað er rætt, men tað hevur verið frammi, at man ynskir, at fíggjarlógin skal ikki vaksa í krónum og oyrum. Og so merkir tað, at tú skal spara einar 160 mill. kr. í alt í mun til tað sum er. Er tað gjørligt, so er tað fínt, men er tað ikki gjørligt, lat okkum so síggja, hvussu langt vit koma.

Tað eg tosi um er broytt lóggáva. Hin parturin, sum ikki er broytt lóggáva, er tað sum landsstýrismenninir á hvør sínum øki hava sett upp og sagt, at tað er tað teir ynskja. Fer man so inn og broytir hetta, so koma eisini nakrar milliónir at verða tiknar av tí partinum á fíggjarlógini. Hetta er so tann politiska prosessin, sum nú skal arbeiðast ígjøgnum sigur løgmaður.

## Ikki slit

Men hvat sigur Anfinn Kallsberg so til, at Palleba heldur tað vera løgið at tosa um sparingar innan tað almenna, samstundis sum tvey nýggj landsstýrisráð verða sett á stovn!

– Tað kann man siga, og eg síggi at eisini, at andstøðan kemur fram við tí. Til tað er at siga, at í samráðingunum um landsstýrið vildi Javnaðarflokkurin hava eitt innanríkisráð og Sambandið vildi hava eitt Heilsumálaráð. Í prinsippinum vil eg siga, at hevði tað verið ein ABC-samgonga, so vóru tey ráðini komin kortini.

Løgmaður sigur annars, at tað er eingin loyna, at turbolensur altíð vil vera rundan um eina fíggjarlóg, soleiðis sum eitt nú formaður Javnaðarfloksins hevur úttalað. Men hann trýr ikki uppá samgonguslit. – Men man kann ongantíð taka nakað fyri givið í politikki leggur hann aftrat.

Løgmaður sigur at enda, at hann dugir ikki at síggja nakran trupulleika í viðgerðini í Fíggjarnevndini, um man ikki ætlar sær at gera nakrar radikalar broytingar. Uppskotið til fíggjarlóg er so bygt uppá tað lógargrundarlag, sum er í dag.






*- Dømi eru um, at smáir útróðrarbátar í seinastuni hava fingið millum tríggjar og fýra krónur fyri kilo av hýsu-3, samtíðis sum størru útróðrarbátarnir hava fingið sjey krónur fyri kilo á telefonuppboðssøluni fyri somu støðd. Eftir at vit hava kannað prísin í eina tíð, kunnu vit bara staðfesta, at samnahangur er ikki millum prísin, ið fæst fyri smáu hýsuna á gólvuppboðssøluni og á telefonuppboðssøluni, og heldur ikki er samanhangur millum prísirnar í Føroyum og prísirnar á evropeiska marknaðinum, sigur Auðunn Konraðsson, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna*

*Tilvildarlig mynd*

# Góðskan ikki avgerandi fyri fiskaprísin

**- Tað ruggar ikki alt rætt, tá dag gomul hýsa-3 verður seld á gólvinum fyri millum tríggjar og fýra krónur kilo, sama dag sum fleiri dagar gomul hýsa-3 verður seld fyri sjey krónur kilo um telefonina. Tað sigur Auðunn Konraðsson, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna, sum mælir til, at broyta reglurnar, so smáa hýsan kann seljast frítt, har besti prísurin fæst fyri hana**

FISKIVINNA

*Jón Brian Hvidtfeldt*

Meginfelag Útróðrarmanna hevur nú í eina tíð sett sjónareygað á vánaliga prísin, sum serliga tann smáa hýsan hevur havt í seinastuni. Felagið hevur fylgt við prísunum í Føroyum, bæði um telefonuppboðssøluna og á gólvinum hjá Fiskamarknaðinum, og samanborið teir við prísirnar í Bretlandi og í Danmark. Og niðurstøðan hjá formanninum í felagnum, Auðunn Konraðsson, er púra greið: als einki samband er millum tað, sum úrtóðrarbátarnir fáa fyri smáu hýsuna á gólvinum hjá Fiskamarknaðinum og tað, sum smáa hýsan verður seld fyri um telefonina. Og harafturat er heldur ikki samband millum prísin í Føroyum, og prísin, sum verður latin fyri smáu hýsuna, bæði á bretska og á danska marknaðinum.

- Eg má siga, at vit duga illa at síggja nakran samanhang millum lága prísin í Føroyum og prísin á evropeiska marknaðinum. Harafturat kann tað tykjast løgið, at sera stórur munur er millum tað, sum smáu útróðrarbátarnir fáa burturúr at selja á gólvinum hjá Fiskamarknaðinum, og tað, sum størru útróðrarbátarnir fáa burturúr at selja um telefonuppboðssøluna, sigur Auðunn Konraðsson.

Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna sigur, at hann er farin at ivast í, hvørt keypararnir yvirhøvur leggja seg eftir at fáa bestu góðsku, tá teir keypa smáu hýsuna. Hann nevnir sum dømi, at ein dag í vikuni seldi ein av smáu útróðrarbátunum hýsu-3 fyri 3,50 krónur kilo á gólvinum hjá Fiskamarknaðinum, samtíðis sum ein av størru útróðrarbátunum fekk sjey krónur kilo fyri hýsu-3 á telefonuppboðssøluni. Auðunn Konraðsson vísir í hesum sambandi á, at smáu útróðrarbátarnir hava feskasta og besta fiskin, meðan fiskurin hjá størru útróðrarbátunum sum oftast er fleiri dagar gamal.

Auðunn Konraðsson sigur seg kenna dømi um, at onkrir útróðrarbátar í seinastuni hava keypt sína egna hýsu á uppboðssøluni fyri tvær krónur kilo, og síðan selt hana aftur á bretska marknaðinum fyri 13 krónur kilo.

- Hetta sigur mær so mikið, sum at okkurt er galið við marknaðinum, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna. Hann leggur afturat, at trupulleikin er at allur fiskur skal um uppboðssølu. Auðunn Konraðsson metir, at ein loysn kundi verið at slept hesum princippi, hvat smáu hýsuni viðvíkur, so til bar at selja smáu hýsuna frítt, har besti prísur fæst fyri hana.

- Persónliga meti eg, at tað kundi verið ein møguleiki at loyvt monnum at selja smáu hýsuna frítt, har teir fingu besta prísin fyri hana, men hetta er so ikki nakað, sum vit hava viðgjørt í Meginfelag Útróðrarmanna, sigur Auðunn Konraðsson.

## Fara at halda eyga við marknaðinum

Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna sigur, at felagið framvegis ætlar sær at fylgja væl við gongdini hjá fiskaprísunum, bæði í Føroyum og á evropeiska marknaðinum. Enn hevur felagið ikki tosað um, hvørji stig teir kunnu taka, fyri at gera vart við seg og møguliga broyta skipanina, men fyribils fer felagið so at halda fram við at vísa á tann manglandi samanhangin millum prísirnar á smáu hýsuni.

Auðunn Konraðsson sigur, at um heystið er nógv av veiðuni smá hýsa, og tí hevur tað stóran týdning fyri útróðrarbátarnar at fáa ein rímuligan prís, eisini fyri hýsu-3. Hann metir, at umleið helvtin av tí, sum útróðrarbátarnir fáa í løtuni, er hýsa, og av hesum munnu góð 60 prosent vera hýsa-3, leggur hann afturat.

Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna letur annars ikki so illa at prísinum av til dømis toski, hóast hann ikki er so góður sum í fjør. Og eisini fæst sum heild hampuligur prísur fyri størru hýsuna, hóast vánaligi prísurin á smáu hýsuni eisini ávirkar her.


**Lloyd's Register letur upp eitt kontór í Føroyum**

Eftir at hava verið umboðað á konsulentbasis í nógv ár, letur Lloyd's Register upp egið kontór í Føroyum. Kontórið, ið lat upp 1. august 2002, skal taka sær av umfatandi maritima tænastu innanfyri sýn, certifisering og ráðgeving.

Leiðari á kontórinum verður Ole R. Lauritsen, sýnsmaður, sum í nógv ár hevur umboðað Lloyd's Register í Føroyum. Ole R. Lauritsen hevur drúgvar royndir á maritima økinum, bæði á sjógvi og landi.

Umboðanin hjá Lloyd's Register er økt í seinastuni. Tí er avgjørt at lata eitt kontór upp í Føroyum, sum skal veita núverandi og møguliga nýggjum kundum okkara betri tænastu.

Lloyd's Register hevur fyri kortum fingið uppgávuna at klassa nýbygningin hjá Strandferðsluni, ið verður bygdur í Spanien. Skipið, ið talan er um, skal røkja rutuna ímillum Suðuroy og Tórshavn fyri Smyril. Eisini eru nýbygningarnir, ið P/F Beta letur byggja í Spania, klassaðir hjá Lloyd's Register.

Lloyd's Register ynskir at takka báðum reiðaríum fyri samarbeiðið.

Lloyd's Register er ein óheft "risk management" fyritøka, ið arbeiðir fyri at betra kvalitets-, trygdar-, umhvørvis- og handilsliga úrslitið hjá kundanum um alla verðina. Okkara arbeiðisumráði umfatar shipping, ídna á landi og somuleiðis olju og gass.

**Lloyd's Register**
FO-490 Strendur
Faroe Islands
Tlf: 44 82 75
Fax: 44 79 79
Email: ole.lauritsen@lr.org
Web: www.lr.org

Lloyd's Register

**Building better business**